Runavíkar Kommuna

Boks 139 · Heiðavegur 26 · FO-100 Saltangará
tlf 417000 · runavik@runavik.fo · www.runavik.fo

# DAGRØKTARI

Dagrøktin á Skála søkir eftir dagrøktarum at byrja 01.12.2007 ella skjótast gjørligt.

**Vit bjóða**
- Eitt sjálvstøðugt og fjølbroytt starv
- Hollan pedagogiskan stuðul frá leiðsluni
- Skipað tilknýti til spælistovuna

**Vit vænta at**
- Tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- Tú hevur hug og áræði at skapa ein tryggan og mennandi gerandisdag við virðing og umsorgan fyri tí einstaka barninum
- Tú hevur góðar umstøður at ansa børnum inni og uttanfyri

**Setanarviðurskifti**
Dagrøktarar eru løntir eftir sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Ein triðingur av lønini verður roknaður sum útreiðslur í sambandi við dagrøktina og er tí skattafríður.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til dagrøktarleiðaran á tlf.44 20 59 ella 58 60 04

**Umsókn**
Skrivlig umsókn skal verða Dagrøktini í hendi í seinasta lagi 20.11.2007.

**Dagrøktin á Skála**
**480 Skála**

# KUNNGERÐ

Tað verður her gjørt kunnugt, at fráboðaða fólkatingsvalið fer fram

**týsdagin tann 13. nov. 2007**
**á kommunuskrivstovuni í Leirvík**

**Atkvøðutíðin verður**

**frá kl. 900 og til kl. 2000**

og verður tá valið endað, so skjótt eingin veljari kemur fram til valavgreiðslu, hóast áheitan.

**Brævatkvøður**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, verða biðin um at boða kommunuskrivstovuni frá **í seinasta lagi fríggjadagin tann 9. nov. 2007 kl. 12.00**. Seinasti rættstundis dagur fyri brævatkvøðugreiðslu er tó leygardagin tann 10. nov. 2007.

Brævatkvøður skulu verða valnevndini, har veljarin stendur á vallista, í hendi innan valið byrjar kl. 9 valdagin.

**Valkort**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða send út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

Mint verður á, at tygum eiga at hava valkortið við á val.

*Leirvík, tann 30. oktober 2007*

**Leirvíkar Kommuna**
*Kulibakki 15 · FO – 520 Leirvík*
*Tlf. 443006 · www.leirvik.fo*
*Teldupostur: leirvik@leirvik.fo*

# KUNNGERÐ

Tað verður her gjørt kunnugt, at fráboðaða fólkatingsvalið fer fram

**týsdagin tann 13. nov. 2007**
**í skúlaauluni við Gøtugjógv.**

**Atkvøðutíðin verður**
**frá kl. 9.00 og til kl. 20.00**

og verður tá valið endað, so skjótt eingin veljari kemur fram til valavgreiðslu, hóast áheitan.

**Brævatkøður**
Tey, ið av ymsum orsøkum heldur ynskja at velja við brævatkvøðu á fólkayvirlitinum (kommunuskrivstovuni) ella heima, verða biðin um at boða kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagi fríggjadagin tann 9. nov. 2007 kl. 15. Seinasti rættstundis dagur fyri bræv- atkvøðugreiðslu er tó leygardagin tann 10. nov. 2007.

Brævatkvøður skulu vera valnevndini, har veljarin stendur á vallista, í hendi innan valið byrjar kl. 9 valdagin.

**Valkort**
Valkort skulu nýtast til valavgreiðsluna. Hesi verða send út við postinum. Veljari, sum ikki fær valkort, ella sum fær valkort við villum í, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt, men annars til og við valdagin.

Minnist vinarligast til at hava valkortið við á val.

Gøtu Kommuna

***29. okt. 2007***

# Viðgerð fyri fobi

Um tú hevur onkra fobi – er sera bangin fyri onkrum ávísum – kanst tú fáa góða viðgerð, samstundis, sum tú lærir at viðgera teg sjálva/sjálvan.

Viðgerðarskeið verður fríggjadagin tann 23. nov kl. 10.00 í Losjuni í Havn. Max 6 luttakarir.

**Tilmelding á tlf. 318286 – 218286.**
**Best eftir kl. 19.00.**

JEGVAN BÆK
AUT. SÁLARFRØÐINGUR



# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

Vikuskiftisvaktin hjá
SOSIALINUM & PORTALINUM
er at hitta alt vikuskiftið á
22 50 00

Ringið um tit hava søgur, hugskot og tips ella um tit vilja kunna um fundir, tiltøk, konsertir o.a., sum fer fram kring alt landið í vikuskiftinum



# Mímir

## MÓTTØKA

**Frítíðarfelagið MIMIR hevur 40 ár á baki tann 7. nov. 2007**

Í hesum sambandi bjóðar MIMIR øllum limum og fyrrverandi limum, eins og øllum, sum vit hava samstarv við, til móttøku í hølum felagsins .

Móttøkan er tann 7. nov. 2007
millum kl. 17.00 og 19.00

**N E V N D I N**

# Ferðslusamskipari og Sølusamskipari

Tvey spennandi størv sum Ferðslusamskipari og Sølusamskipari eru leys at søkja á Strandfaraskip Landsins. Umsóknarfreistin er 8. novembur. Sí lýsingarnar á heimasíðu okkara www.ssl.fo

STRANDFARASKIP LANDSINS

Visti tú ikki tað? Sosialurin